# Íbúð í Keypmannahavn til sølu

## Stílreint luksus á Østerbro – 73 fermetrar

**Hægsta boð yvir 1.950.000 kr.**

**Umráðið:** Ekslusivt og friðarligt. Góðir innkeypsmøguleikar. Tætt vid Kafé'ir, fitness, Kildevælds- og Fælledparkina og Svanemølle-togstød. Gongufrástøða inn á Strøg'ið.

**Ognin:** Vælhildin og vældrivin ogn við hurðartelefon, fjarhita og alnót. Góður grønur avbyrgdur garður við spæliplássi.

**Íbúðin:** Til ber at møbelera gongina, hagani atgongd er til smagsfullan nýumvældan køk við spottljósi í loftinum og dygdargóðum hvítvørum, m.a. uppvaskimaskinu. Nógvar flottar luksusdetaljur. Stórt nýtt flisabaðirúm við brúsurúmi. Sovikamar við nógvum skápum og stova við klassiskum stuklofti og breiðum plankagólvi, sum gongur aftur í allari íbúðini. Snotiligt gestakamar.

**Heini Hanusarson**
hanusarson@yahoo.dk
tlf. 506665
Keypsprísur í 2006 var 2.600.000 kr.

**Ger kvettið!**




Sosialurin

FØROYABANKI




**Kunningarfundur um flogskipara útbúgvingina verður í Miðlahúsinum hóskvøldið 10 juni kl. 19:00**

Tað er helst mong ung sum vaksin, ið hava ein dreym um at gerast flogskipari.

Ein av skúlunum, sum kann gera hendan dreym til veruleika, er Center Air í Roskilde, sum hevur drúgvar royndir innan hetta yrkið.

Martin Bendix dagligur leiðari kemur at greiða frá útbúgvingini hjá Center Air Pilot Academy, har í løtuni 6 føroyskir næmingar ganga.

Eisini verður Tommy Andreasen frá Nólsoy við á fundinum. Tommy bleiv liðugur sum flogskipari á Center Air 1. desember 2009 og er hann just byrjaður hjá Ryan Air og verður høvi at seta honum spurningar.




FØROYA HANDILSSKÚLI



### Føroya Handilsskúli søkir eftir

# Lærara í forritan

### til teldustøðingaútbúgvingina

**Um teldustøðingaútbúgvingina**
Teldustøðingaútbúgvingin er styttri framhaldsútbúgving, ið tekur 2½ ár. Útbúgvingin fevnir í høvuðsheitum um systemmenning, forritan, tøkni og virki. Kjarnuøkini eru systemmenning og forritan; tøkni og virki eru ætlað at stuðla undir kjarnuøkini. Umframt hetta eru seinast í útbúgvingini sergrein, praktikk og høvuðsuppgáva. Neyvari kunning um útbúgvingina er á heimasíðu skúlans, www.fh.fo.

**Arbeiðsuppgávur tínar eru m.a. at:**
- undirvísa í viðkomandi lærugreinum innan forritan og tøkni (eitt nú softwarearkitektur, distribueraðar skipanir)
- leggja til rættis undirvísingargongdir, verkætlanir og próvtøkur
- leggja til rættis fakliga innihaldið í útbúgvingini í samstarvi við leiðslu skúlans
- luttaka í ráðlegging og verkætlanum á skúlanum

**Vit vænta, at tú:**
- hevur viðkomandi útbúgving á kandidatstigi ella aðra hægri útbúgving, ið gevur førleikar at undirvísa teldustøðingum
- hevur áhuga í undirvísing
- dugir væl at samstarva og samskifta
- vilt vera við til at menna útbúgvingina og skúlan
- ikki ræðist nýggjar avbjóðingar

Tað er fyrimunur, men ikki ein treyt, at umsøkjarin hevur royndir við líknandi undirvísing.

**Vit kunnu m.a. bjóða:**
- eitt fakliga mennandi undirvísingarumhvørvi
- eftirútbúgvingarmøguleikar
- góðar arbeiðsumstøður
- ein spennandi og gevandi gerandisdag

**Setanartreytir:**
Starvið er tíðaravmarkað og verður sett eitt ár í senn. Talan er um parttíðarstarv, setanarbrøkur verður avtalað við tann, ið settur verður. Starvsstaður er Handilsskúlin í Tórshavn. Lærarar á teldustøðingaútbúgvingini verða løntir sambært galdandi sáttmála.

Starvið verður sett skjótast til ber, og í seinasta lagi 1. august 2010, um ikki onnur avtala verður gjørd.

**Umsóknir:**
Umsóknir við avritum av viðkomandi skjølum vera at senda Føroya Handilsskúla, Marknagilsvegi 77, Postsmogu 177, 110 Tórshavn. Umsóknir skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 17. juni 2010.

Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Ainu L. Knudsen á telduposti alk@hsh.fo.

**FØROYA HANDILSSKÚLI**

Marknagilsvegur 77
Postsmoga 177
110 Tórshavn
Tlf 317177
Fax 313374
www.fh.fo

Á Føroya Handilsskúla ganga umleið 200 næmingar á Hægri Handilsskúla (HH) og 200 næmingar á Fyrisiting, handli og skrivstovu (FHS). Undirvísingin fer fram í Havn og á Kambsdali. Í Havn starvast um 35 lærarar, á Kambsdali 30. Umframt HH og FHS skipar Føroya Handilsskúli fyri kvøldskúla- og framhaldsútbúgvingum, so sum teldustøðingaútbúgving, HD og akademiútbúgving. Teldustøðingaútbúgvingin er skipað sum fulltíðarlestur í 2½ ár.

## Ein úr Kaliforniu lýsir Føroyar

**Málningar eftir Sigrid Ewald**

**Opið er: 10. – 16. juni – frá kl. 10.00 – 19.00 hvønn dag**

**Tó 16. juni frá kl. 10.00 – 14.00**

**Smiðjan í Lítluvík**

# Lesið Sosialin

**www.sosialurin.fo**